TILTØK

FØÐINGAR

27. februar fingu Una Hansen, Æðuvík og Jákup Pauli Jacobsen, Skálafirði, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3100 gr.

2. mars fingu Connie og Rólant Christensen, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4150 gr.

5. mars fingu Agnetha og Búgvi Jacobsen, Nólsoy, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3480 gr.

5. mars fingu Sunneva Hammer, Hvalba og Kristian Stórhamar, Trongisvágur, eina dóttur. Hon var 47 cm. long og vigaði 2800 gr.

5. mars fingu Ingun og Robert Langgaard, Runavík, eina dóttur. Hon var 58 cm. long og vigaði 4300 gr.

5. mars fingu Rakul Nolsøe og Michael í Lágabø, Vágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3830 gr.

6. mars fingu Margareth og Andrew Djurhuus, Syðrugøta, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 4400 gr.

6. mars fingu Anni og Jóhan S. Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3600 gr.

6. mars fingu Anni Debess og Johan V. Bech, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4050 gr.

7. mars fingu Randi Hellisdal Zachariasen og Atli Zachariasen, Argir, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

8. mars fingu Nansy og John Simonsen, Sørvágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3750 gr.

8. mars fingu Dagmar og Johan Beder, Kambsdalur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4050 gr.

ANDLÁT

28. februar:
Conrad Joensen, Tórshavn, 93 ár.
Sigurd Fredrik Jacobsen, Syðradalur, 87 ár.

03. mars:
Roy Alexander Kilgour, Tvøroyri, 60 ár.

05. mars:
Niels Pauli Petersen í Rødovre, ættaður úr Trongisvági, 77 ár.

BRÚDLEYP

10. mars giftast Ó. Maria Bech og Jóhann Simonsen. Vígslan verður kl. 15 í samkomuni Immanuel, Hoyvík. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.

SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 14. mars hava hjúnini Lydia og Henning Pedersen, Ishøj, silvurbrúdleyp. Lydia er ættað úr Vági og Henning er fyrrverandi yvirkonstápul úr Mjørkadali. Opið hús er tann dagin í heiminum.
Adr.: Landlyst Vænge 70, 2635 Ishøj.

GULLBRÚDLEYP

Hósdagin 15. mars kunnu hjúnini Hjørdis og Poul Christiansen í Havn halda gullbrúdleyp. Opið hús verður í heiminum frá kl. 18.

Leygardagin 24. mars hava Hildigarð og Hans Høghamar á Eiði gullbrúdleyp. Tey ið vilja gleða tey bæði, biðjast siga frá innan 15. mars á tlf. 423045.

Gudstænastur
2. sunnudagur í føstu
Hósvík: kl. 12, Emil Olsen
Kvívík: kl. 12, Inga Poulsen Dam
Kvívík: kl. 17 føstugudstænasta (sálmar við Petru Iversen, Stamen Stantchev og Edvard Nyholm Debes)
Vágur: kl. 11, altarg., Erland Beder
Tvøroyri: kl. 11, Ólavur Rasmussen
Saksun: kl. 11, Marjun Bæk
Vesturkirkjan: kl. 11, altarg. Heri Joensen
Argir: kl. 11, familjugudstænasta, Sound of Glory syngur, Bergur D. Joensen
Havnar kirkja: kl. 11, Bjarni Bæk
Kaldbak: kl. 12, Sonja Klein
Hvannasund: kl. 12, altarg.,
Hattarvík: kl. 17,
Kirkja: kl. 19, Elsa Funding
Oyndarfjørður: kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
Miðvágur: kl. 12, David Johannesen
Fuglafjørður: kl. 12,
Sandavágur: kl. 18, Uni Næs
Christianskirkjan: kl. 11, altarg.,
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 10.00,
Kunoy: kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
Rituvík: kl. 11, Meinhard Bjartalíð
Skúvoy: kl. 12, Jákup Rein ert Hansen
Skúlin á Hvítanesi: kl. 11, Sverri Steinhólm

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 heldur møtirøðin áfram við evninum »Frá ótta og stúran til trúgv og gleði«.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11,
kl. 12.15 sunnudagsskúli,
kl. 18 evangeliskt møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti v/ Ólavur Jacobsen, Liquid Gravity luttekur við sangi og vitnisburði.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið í Havn
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Alfred Hansen, barnaansing er møtan møti er.
Mánakvøldið kl. 19 verður LU-arbeiðið – Grýturættur, kl. 20 venur Manskórið.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Sunnivu og Hans Jacob Poulsen.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Johannu Gaard Joensen, Vallalíð 1. Øll eru vælkomin.

Rhema á Hálsi
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman, Poul Sørensen sigur frá um Grækarismessu.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Vegna grækarismessuhaldið er sunnudagsskúlin avlýstur. Víst verður til familjugudstænastuna kl. 11, har øll eru vælkomin.
Sunnudagin kl. 18 møti, Bergur D. Joensen.
Mánakvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Møguleiki er at hoyra talur frá møtum á heimasíðu okkara: www.koma.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Vegna jarðarferð er sunnudagsskúlin og møti avlýst.
Mánadagin kl. 17 Skótar.

»Tíð til Gud«
verður úti í Pállstovu sunnukvøldið kl. 21.
Dánjal Petersen talar.
Dánjal av Rana og Jógvan Skúlindal skipa fyri.

Sjómanskvinnuringurin í Havn
kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið 12. mars kl. 20.

Filadelfia, Sundalagi
Í morgin kl. 18 kvøldmøti.
Mikudagin frá kl. 19 til 21 Miðdepilin, eitt trivnaðarstað fyri ung.

Hvalvíkar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 greiða Mejnhardt og Judith Hansen, av Nesi, frá ferð í Ísrael, ljósmyndir verða sýndar. Drekka aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Ungdómslegan byrjar fríggjakvøldið kl. 20. Einki opið hús leygarkvøldið vegna ungdómslegu.
Sunnudagin kl. 17 møti við teimum ungu. Tú ert vælkomin í Kelduna.

Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará. Húsmøti verður týsdagin kl. 19 hjá Jonnu og Palla Højgaard, Saltangará. Verið hjartaliga vælkomin.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti við Kajberg Davidsen. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið í Leirvík
Í kvøld verður ungdómsmøti við Vagn Foldbo.
Sunnukvøldið kl. 18 verður blákrossmøti, m.a. greiðir misnýtari frá lívi sínum. Øll eru vælkomin.

Lívsins Orð
Barnamøti verður leygardagin kl. 17.30 og opið hús kl. 20.30.
Sunnudagin kl. 17 verður møti.

Soli Deo Gloria
Hvønn mánadag kl. 20 bíbliutími og bønarmøti.
Hvønn hósdag kl. 20 ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 22 opið hús.
Sunnudagin 11. kl. 14.00 sunnudagsskúli, kl. 16.30 ALPHA skeið (11-15 ár) kl. 18.00 møti við luttøku úr Rhema. Øll eru hjartaliga vælkomin.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Níggjunda boð: Tú mást ikki girnast hús næsta tíns.

Her verður talað beinleiðis til okkara hug og sinni. At girnast nakað er at hava eitt sterkt ynski um ella tráan eftir at at fáa fatur í einumhvørjum, sum vit ikki eiga ella hava rætt til. Vit hava ymisk orð fyri hesum sama: at øvunda, at misunna. Ofta hava hesi bæði orðini ikki so álvarsligan týdning, men kunnu kortini, um tey fáa ov stórt rásarúm í okkara hugaheimi, forða fyri betri tankavirksemi, sum til dømis heldur at unna næsta okkara góðar umstøður, ístaðin fyri at misunna honum tær.

Nógv av hinum boðunum hava talað til okkara um ikki at fremja gerðir, sum kunnu vera til skaða fyri okkara medmenniskju. Heldur byggja upp enn bróta niður, tað er jú best fyri allar partar. Hetta boð sigur nakað um okkara sinnalag, okkara hugsan og tankar. Vit hava sum fyrimynd Jesus sjálvan, hann, sum gjørdist menniskja, okkum líkur, og sum vit trúgva uppá. Paulus minnir okkum á, at sama sinnalag má vera í okkum, sum eisini var í Kristi Jesusi. Eyðmýkt og lítillætni eyðkendi Jesus, sum ikki tráaði eftir verðsligum ríkidømi, men tvørtur ímóti ávaraði ímóti tí. At vera nøgdur her í lívinum gevur frið í sálina, at misunna øðrum er at vera ónøgdur, og tað førir í longdini til strongd.

Sinnalag okkara hevur so ómetaliga nógv at siga, hvussu vit hava tað, bæði likamliga og andaliga.

Tí er tað av alstórum týdningi, hvør ávirkar okkum andaliga, og hvørjum umhvørvi vit liva í. Vit hava nýliga hátíðarhildið túsund ár fyri kristindóminum í Føroyum. Tað árin, sum kristindómurin hevur havt her á landi, hevur víst seg í hugburði og dagligari lívsførslu, sum hevur verið til gleði og gagns fyri fólk og land sum heild. Her hava boðini úr Halgu bók verið rættleiðandi. Eisini hetta boð um ikki at girnast hús næstans. Ikki misunna. Ikki ogna sær órættvíst nakað, sum ein annar eigur, og heldur ikki royna at fáa vald, fyri at fremja sínar persónligu ætlanir.

Maktgirnd er nakað, sum er okkum í holdið borið, og sum tíverri nógvastaðni ger seg galdandi eisini innan andalig økir, har summi vilja fáa sær vald til at ráða yvir og avgera fyri onnur, hvat er rætt, og hvat er skeivt. Hesin hugburður hevur ikki verið vanligur okkara millum. Bíblian hevur í túsund ár verið grundarlagið fyri tí, sum vit trúgva og gera. Maktgirnd er í andsøgn við eyðmýkt og lítillætni og tað kristna sinnalag, sum vit stremba eftir at ogna okkum. Tí hevur hetta boð eisini nakað at siga okkum í dag.

Eitt bíbilorð til seinast: Atferð tykkara veri uttan peningaágirnd; verið nøgdir við tað, sum tit hava.

Sigvald Kristiansen

TILTØK

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Onki møti vegna sangmøti á Sandi.
Týsdagin kl. 20 bíbiltími.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 20 møti við Regin Høgnesen, trúboðara. Ungdómsbólkur av Tvøroyri syngur og spælir.
Sunnudagin verður familjumøti kl. 15, kl. 18 møti við Regin Høgnesen.
Ymiskar sangkreftir luttka.
Sunnukvøldið verður innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11, breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin 12. kl. 20 bønarfundur.
Týsdagin 13. kl. 20 ungdómsfundur.
Ónsdagin 14. kl. 20 uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 bøn og lovsangur.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við major Knut Gamst.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

Føroysk møti
Odense: Føroyskt møti í føroyingahúsinum »Miðgarði« (Rugårdsvej 23 kld.) sunnudagin 11. kl. 16 við Hera Elttør, kaffi verður aftaná møti.
13. mars í Missiónshúsinum í Handbjerk kl. 19.30.
14. mars í Missiónshúsinum í Hodsager kl. 19.30.
Øll hjartaliga vælkomin.

Frá Felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði kl. 14.00 í Jákupsstovu, J. Patursonargøta 24, 100 Tórshavn.
Nærri fæst at vita hjá Annvør Nielsen tlf. 317261, Helle Johansen tlf. 317940 ella Sólgerð Foldbo tlf. 422184.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

VBA-fundir
Fundur fyri vaksin børn hjá alkoholikarum/ella ørkymlandi familjuviðurskiftum, eru hvørt leygarkvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 (opin fundur).
Fundirnir eru á Vaskarínum, Tórsgøta 5.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Leygardagin: kl. 17-18.
Sunnudagin: kl. 11-12.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 12.3.
kl. 9.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 10.15-12 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresufelagskapin
kl. 15 Ársfundur, val av trimum tiltakslimum
kl. 16-18 Tilhaldið trý ára føðingardag – drekka og lagkøka. Speaker corner. Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491
Týsdagin 13.3.
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Eivør Pálsdóttir við manning syngja
Mikudagin 14.3.
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði (tilm. mánadag 316491)
kl. 14.30 Túrur. Várframsýning í Listaskálanum.
Hósdagin 15.3.
kl. 10.30-11 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát á 1. hædd
Fríggjadagin 9.3.
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Pensionistafelagið í Havn
Í føstuni møtast vit hvørt hóskvøld kl. 19 í Losjuni, Tinghúsvegur 18. Hevur tú fylt 60 ár, er tú vælkomin at gerast limur.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geils-gøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14.00 til 20.00 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupost-ur lisa@lisa.fo – heima-síða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

KRIS í Føroyum
Ráðgevingar og viðtalu telefonin er nú opin hvørt mánakvøld og hóskvøld á tlf. 458181 frá kl. 20-22. Møguleiki er eisini fyri at skriva beinleiðis til felagið á adr.: KRIS í Føroyum, boks 345, 700 Klaksvík.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiski-menn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Nor-egi. Lima-gjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Føroya Astma/Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovu-tíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Rand-fríð

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygard. 10. mars: Georg Egholm, tlf. 448016
Sunnud. 11. mars: Georg Egholm, tlf. 448016

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

Ung í Føroyum 2001

Myndir og málningar frá tiltakinum "Ung í Føroyum 2001" verða nú at síggja í Føroya Banka

Føroya Banki hevur stuðlað tiltakinum "Ung í Føroyum 2001", og sum liður í hesum verður skipað fyri eini ferðandi framsýning í deildum bankans.

Framsýningarnar verða frá týsdegi kl. 09.30 til og við fríggjadag kl. 16.00 á hesum stødum:

Tórshavn	13. -16. mars 2001
Saltangará	20. - 23. mars 2001
Miðvágur	27. - 30 mars 2001
Tvøroyri	3. - 6. apríl 2001
Klaksvík	9. - 11. apríl 2001

kontoIN
okkara ungdómskonto

pætur & pætur - 320870